

# Vit ynskja tær eini góð og hugnalig jól

Jólini og tíðin undan jólum er ein serlig tíð. Tey flestu taka sær góðar stundir at hugna sær saman við familjuni og øðrum.

Eisini tendra vit fleiri ljós hesa tíðina enn vanligt. Tað livandi, bleiktrandi ljósið setur ein serligan dám á myrku tíðina upp undir jól.

Mitt í allari gleðini og stákinum eiga vit at seta trygdina í hásæti. Serliga verður hugsað um roykalarmar og eldsløkkjarar. Ein minni útgerð, sum kann bjarga okkum lívinum. Vit vilja heita á øll, ið enn ikki eiga hesa útgerð, um at fáa hana til vega. Tey, ið eiga hesa útgerð, minna vit á at kanna eftir, at hon er í lagi.

Alt húskið, bæði stór og smá, eiga at duga at finna og nýta útgerðina, verður tað neyðugt.

Tað er okkara ynski, at vit øll á tryggasta hátt kunnu njóta hátíðina og koma væl inn í nýggja árið.

**www.trygging.fo**

Kongabrúgvin, Postboks 329,FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

*- so ert tú tryggari*